# Putin er harður

Russiski forsætisráðharrin, Vladimir Putin, hevur fleiri ferðir prógvað, at hann hevur mansevni. Eitt nú hevur hann sitið við stýrið í hernaðarflogførum, hann hevur skotið tikarar, og vit hava fleiri ferðir sæð myndir av honum í judo-dystum. Alt hetta hevur gjørt, at Putin er sera væl umtóktur millum tær russisku kvinnurnar, og tær munnu halda uppaftur meiri av honum nú. Tí fyrradagin var Putin niðri í Baikalvatninum við einum serligum kavbáti. Putin var 1.400 metrar undir vatnskorpuni, skriva russisku fjølmiðlarnir.



# Tørvur á meiri hjálp

Fær tað danska vinnulívið ikki eina hjálpandi hon frá stjórnini, verða nógvar fyritøkur noyddar at gevast við virksemi sínum. Tað sigur felagið Dansk Erhverv. Danska kringvarpið visti í gjár at siga, at næstan 2.900 fyritøkur fóru á húsagang teir fyrstu seks mánaðirnar í ár, og at tað er næstan tvær ferðir so nógvar sum í sama tíðarskeiði í fjør. Í vár fingu danskar fyritøkur loyvi til at bíða við at avrokna meirvirðisgjaldið. Tað var eitt gott tiltak, men vit hava brúk fyri, at tað verður endurtikið nú, segði Bo Sandberg hjá Dansk Erhverv við DR. Annars lata nógvar fyritøkur aftur, segði hann.

# Føroyski »Othello« til Monaco

**Í sambandi við at sjónleikurin »Othello« er boðin til altjóða sjónleikafestival í Monaco, verður skipað fyri tveimum stuðulssýningum í næstum**

LEIKLIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nú sjónleikarabólkurin Hurðar er boðin á altjóða sjónleikafestival í Monaco, fáa føroyingar eisini enn eitt høvi at síggja leikin, tá skipað verður fyri stuðulssýningum í Norðurlandahúsinum og Mentanarhúsinum.

## Stórur heiður

Tað var í fjør, at leikbólkurin Huðrar setti upp kenda leikin "Othello" eftir Shakespeare í Sjónleikarhúsinum. Sýningin varð væl móttikin, og í heyst var bólkurin á tí norður-europeiska NEATA-festivalinum í Riga, Latvia, har sýningin var mett at vera ein av teimum bestu á festivalinum.

Nú er "Othello" so boðin á altjóða Mondial du Theatre-festivalin í Monaco. ì skrivi sigur bólkurin, at tað er ein stórur heiður fyri ein so ungan og óroyndan sjónleikarabólk at verða boðin við á ein tílíkan festival.

»Mondial du Theatre« hevur verið hildin fjórða hvørt ár síðan 1957, tá ið Guy Brousse og René Cellario gjørdu av at bjóða øllum heimsins sjónleikaraáhugaðum til Monaco. 11 lond vóru við fyrstu ferð, og í 1973 var talið vaksið til 20. Í ár, trettandu ferð festivalurin verður hildin, eru 24 luttakandi bólkar úr so ymsum londum sum Marokko, Kina, Australia, Congo, Peru, USA, India... og Føroyum.

## Biðin at senda umsókn

Mondial du Theatre er eitt av teimum størstu og mest virdu tiltøkunum fyri áhugasjónleikarar í heiminum. Altjóða Áhugaleikarafelagsskapurin (IATA) hevur lagt aðalfund sín samstundis sum festivalurin, og bara teir bestu leikirnir sleppa við.

Aftaná góðu móttøkuna í Riga vórðu Huðrar biðin um at senda eina umsókn til Mondial du Theatre. Flestu Norðurlond hava verið umboða har onkuntíð, men í ár vóru tað bara Føroyar og Finnland, ið sluppu gjøgnum nálareygað. Hetta er fyrstu ferð at Føroyar eru umboðaðar á einum tílíkum altjóða tiltaki.



*Frá leikinum »Othello«, sum nú skal umboða Føroyar á altjóða sjónleikafestival í Monaco*

*Mynd: Hallur Helmsdal*

## Tørv á stuðli

Nú leikbólkurin fer avstað, hava tey gjørt av at leggja leiðina um Ísland.

Her hava tey fingið samband við ein íslendskan leikbólk, ið somuleiðis spælir »Othello«. Ætlanin er, at báðir bólkarnir skulu framføra sína útgávu beint eftir hvønn annan, fyrst í Iðnó í Reykjavík og síðan í Húsavík á norðurlandinum.

Ein slík leikferð kostar nógv, og tí fara Huðrar at skipa fyri stuðulssýningum í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 5. august klokkan 19 og klokkan 21, og Mentunarhúsinum í Fuglafirði sunnudagin 9. august. Umframt prísin á atgongumerkinum eru fólk vælkomin at lata meira, um tey vilja stuðla leikferðini.

# Herverk á Kosmiska Rúmið



*Eitt gapandi hol og djúpar sprekkur í glasinum skemma nú "Kosmiska rúmið", sum ótangar hevndu seg inn á farna vikiskifti*

**Síðsta vikuskifti varð herverk framt á listaverkið "Kosmiska rúmið" hjá Trónda Paturssyni, sum stendur á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn**

HERVERK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

»Kosmiska rúmið hjá Trónda Paturssyni er tíverri lukkað vegna herverk«.

Soleiðis stóð í vikuni at




lesa við inngongdina til sermerkta listaverkið á Norðurbryggjuni, ið vanliga lokkar nógv vitjandi á gátt.

Tá starvsfólk á Bryggjuni komu til arbeiðis mánamorgunin varnaðust tey, at hurðin inn til "Kosmiska rúmið" var brotin upp. Inni í rúminum sløddust glaspetti á gólvinum, ið stavaðu frá einum stórum holi í eini av spegilsplátunum uppi undir loftinum.

Enn vistu starvsfólkini ikki at siga, hvussu skaðin kann bøtast aftur, ella hvat tað fer at kosta.

Íblásturin til "Kosmiska rúmið" fekk Tróndur Patursson eina myrka nátt á havinum, tá báturin, hann og aðrir vóru í, var um at søkka, og hav og himmal stóðu í einum.

Tað er hendan kenslan av at vera staddur í einum óendaligum rúmi, ið Tróndur Patursson hevur lagt seg eftir at endurskapa í sínum glas- og spegilsinstallatiónum í "Kosmiska rúminum" - men sum also nú er týðuliga skemmað av einum gapandi holi og djúpum sprekkum í glasinum.